# Serráðgevi
## á
## Almannastovuni

Eitt fulltíðarstarv sum serráðgevi við tænastu á Barna- og Ungdómsdeildini í Tórshavn er leyst at seta sum skjótast.

**Um deildina**
Á Barna- og Ungdómsdeildini arbeiða 7 fólk. Starvið inniber ferðing um alt landið.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki**
At veita ráð og vegleiðing innan barnaforsorgarøkið, og um stuðulstiltøk innan almannaøkið
At veita ráð og vegleiðing til familjur at børnum við skerdum likamligum og /ella sálarligum førleika.
Vegleiða og ráðgeva barnaverndarnevndum
Viðgera tilmælir um tiltøk smb. barnaforsorgarlógini
Viðgera umsóknir um stuðul og hjálpartiltøk smb. forsorgarlógini

**Útbúgving**
Viðkomandi útbúgving, t.d. sosialráðgevi, námsfrøðingur, lærari, sjúkrarøktarfrøðingur
Ynskiligt er at tú hevur viðkomandi eftirútbúgving.

**Førleikakrøv**
Góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
Góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
Góð samstarvsevni
Evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt

**Lønar- og setanarviðurskiftir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Beintu Festirstein, deildarleiðara tlf. 353510

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Jónas Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn í hendi **innan 27.01.2005.**

# Sjúkravikarur søkist

Søkt verður eftir sjúkravikari til frítíðaransingina og barnagarðin á Gásamýru í Leirvík.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at venda sær til leiðaran Annu Djurhuus tlf. 443325/743125.

Skrivlig umsókn skal sendast til Leirvíkar kommunu áðrenn 14.02.2005 kl. 12.00.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

# Sosialráðgevi
## á
## Almannastovuni

Eitt fulltíðarstarv sum sosialráðgevi við tænastu á Økisdeildini í Tórshavn er leyst at seta sum skjótast.

**Um deildina**
Á Økisdeildini í Tórshavn arbeiða 14 fólk. Økið hjá deildini er Streymoy, Vágar, Nólsoy, Hestur, Skúvoy og Sandur. Starvið kann innibera ferðing.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er**
- at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuna
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

**Tær sosialu fyriskipanirnar, ið deildin serliga tekur sær av eru**
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensiónir

**Førleikakrøv**
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyðvør Mortensen, deildarleiðara á tlf. 35 35 10.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Jónas Broncksgøta 27, postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi **innan 27. januar 2005.**

# Felagið fyri kirkjuráðslimir

Skipar fyri kunnandi fundum kring landið komandi vikurnar.

Umboð fyri próstadømisráðið vera við á fundunum. Allir kirkjuráðslimir eru vælkomnir.

| | |
|---|---|
| 24. januar kl. 19.30 | Meinigheitshúsið á Skála |
| 25. januar kl. 19.30 | Vesturkirkjan |
| 27. januar kl. 19.30 | Christianskirkjan |
| 31. januar kl. 19.30 | Skúlin í Sørvági |
| 4. februar kl. 20.00 | Ungmannafelagshúsið Samljóð í Skopun |
| 6. februar kl. 14.30 | Gistingarhúsið í Øravík |

# Pedagogur søkist til dagstovnin í Gøtu

1 pedagogur til starv fyri pedagog í barsil.
Arbeiðið er í vøggustovuni á Rókini, at byrja 29.03.2005 til 01.04.2006.
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.
Á stovuni er pláss til 14 børn í aldrinum 0–2 ár.
Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

1 avloysari søkist til arbeiðið, tá í fólk eru sjúk ella hava feriu.
Arbeiðið er um allan stovnin, við børnum frá 0–7 ár, at byrja 15.04.2005 til 01.01.06.

Dagstovnurin læt upp 1. februar 2000 og liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi við Gøtugjógv.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsing um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10 ella fartlf. 218012
Skrivlig umsókn skal sendast okkum áðrenn mánadagin 14.02.05.
Bygdaráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
**boks 32**
**511 Gøtugjógv**

# Fólkatingsvalið 8. feb. 2005

**Til veljarar í Sjóvar kommunu.**

Valið fer fram á hesum støðum:

**í bygdahúsinum á Strondum**
**og í skúlanum á Selatrað**

frá kl. 9.00 - 20.00

Valkort verða borðin veljarunum.

Seinasta freist at greiða brævatkvøðu til fólkatingsvalið er leygardagin 5. feb.

Tey, ið ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 44 71 58 innan kl. 12.00 fríggjadagin 4. feb.

Minnist til at hava valkortið við á val.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur